# So gongur tann gleðistreymur í ring



Tá stevnan varð sett, varð tíð hjá luttakarunum at sýna fram síni kynstur, og eitt sindur ymiskt var, hvussu tey komu frá tí, skal sigast

Mynd: Jens K. Vang

**Stóra dansistevna Havleikur 2002 varð sett á Vaglinum í Havn mikukvøldið. Einir 600 dansarar luttaka á stevnuni, og vóru teir flestu savnaðir á Vaglinum, umframt nógv onnur, sum komin vóru at hyggja at, tá stevnan varð sett**

DANSISTEVNA
*Edvard Joensen*

**Tórshavn:** Stóra norðurlendska dansistevnan, Havleikur 2002, varð sett í fínastu líkindum á Vaglinum í Havn mikukvøldið.

Fólk savnaðist sum vanligt er til slík høvi. Tey komu úr ymsum heraðshornum, og áðrenn nakran vardi, var rættiliga væl av fólki savnað kring Vaglið og niðan móti Tinghúsinum. Nógv vóru í føroyskum búna. Eyðvita fólk, sum luttaka á stevnuni og skuldu vera við í teimum tiltøkum, sum skudu vera út á kvøldið.

Fólk bíðaði eftir, at okkurt skuldi henda, og tað gjørdi tað so. Tí niðan eftir Áarvegnum kom flagskrýdd skrúðgonga við dansarum, sum halda til á Eysturskúlanum. Ymsu norðurlendsku fløggini vóur at síggja, umframt tað hetlendska, sum eisini var umboðað.

Og tað var, sum formaðurin í Slaíð Ring, landsfelagnumm hjá føroysku dansifeløgunum siteraði úr Orminum Langa, at fagurt var tað lið, sum savnað var hetta summarkvøldið í góðveðrinum til dans og leik, sum eisini liggur í navninum Havleikur.

Sum slíkum tiltøkum líkt byrjaði tað við røðum frá ymsum myndugleikum og persónum, sum ynsktu gestunum, bæði útlendskum eins og føroysku luttakarunum, vælkomnum.

Røðararnir tóku allir í føroyska mentan og serliga dans. Onkur var kanska í so langrøkin. Tað er helst ikki neyðugt at brúka nógva tíð at greiða fólki, sum komið er uttanlendis at dansa, frá, hvat føroyskur dansur er. Tað vita tey, tí tey hava áhuga fyri tí. Sum tað eisini sást, tá tikið varð saman móti endanum, og øll dansaðu til fyrra part av Orminum Langa. Trupuleiki var eingin við stevinum hjá hesum fólkum. Tey eru jú vandir dansarar.

Men Havnin hevði gjørt sítt besta at taka væl í móti gestunum, og tað má sigast, at tað eydnaðist til fulnar.

Flagskrýddi býurin vísti seg frá síni bestu síðu, eins og veðrið eisini var til vildar.

At onnur mentanartiltøk samstundis eru i býnum, ger ivaleyst ikki upplivilsið hjá dansarunum minni.

Eftir at umboð fyri fyrireikararnar, Sláið Ring, og borgarstjróan í Havn høvdu hildið røðu, setti landsstýrismaðurin við mentamálum, Annlis Bjarkhamar, stevnuna.

Tá stevnan varð sett, varð tíð hjá luttakarunum at sýna fram síni kynstur, og eitt sindur ymiskt var, hvussu tey komu frá tí, skal sigast.

Fyrsta byrjanin var eitt sindur trilvandi. Álendingar høvdu valt einar tveir eitt sindur stillar dansir, sum ikki rættiliga fingu lív í fólkið, sum stóð rundan um og hugdi at. Men stuttligt var tó at hoyra songkvinnuna syngja um gentuna, sum sat og spann og bíðaði eftir biðlinum, sum ikki kom. Jú, vit kennast við. Hon stóð har við rokkin og spann.

Men tá danirnir beint aftan á komu út á asfaltið og fóru at dansa, kom rættiligt lív í. Tey vístu av sonnum, at tey vóru komnir til leik og spæl, og sóu út til at njóta hvørt stig, tey tóku.

Eisini hetlendingarnir vórðu væl fagnaðir. Tey høvdu, eins og danirnir, léttar dansir og lívlig løg. At fólkini so einsi vóru ung, ein smágenta upp á eini sjey-átta ár var við, og hon dugdi væl at dansa, helt hýrinum hjá áskoðarunum uppi.

Soleiðsi gekk slag í slag, til føroyingar áttu at enda. Fyrst fólk úr Dansifrøi, áðrenn tikið varð saman í ring og øll, sum vóru á Vaglinum, vórðu boðin uppí.

Hetta gekk eisini rímiliga væl. Fólk dugdu stev, og føroyingarnir kvóðu við, sum vera man, hóast tað skiltist á skiparanum aftaná, at hann helt seg hava klárað tað fult so gott áður.

Setanin á Vaglinum var at enda komin, og dansifólkið, við føroyingum kvøðandi á odda, fór í skrúðgongu niðan í Sjónleikarhúsið og fimleikarhallirnar i Kommunuskúlanum, har dansast skuldi til midnátt. Sonevndur samansjóðingardansur, skuldi vera.







# Framløga um ferjuleguna á Syðradali

**Mikukvøldið hevði Landsverkfrøðingurin eina framløgu um ætlaðu ferjuleguna, sum skal verða á Syðradali á Kalsoynni, fyri bygdarfólkunum. Undirtøkan var góð. Umleið 40 fólk vóru í bygdarhúsinum á Húsum til framløguna**

SAMFERÐSLA
*Solby A. Eliasen*

Landsverkfrøðingurin hevði eina framløgu, har greitt varð frá tíðarætlanini. Eisini vóru tekningar og myndir av ætlaðu ferjuleguni, umframt modellroyndir, skipssimuleringar, og projekt løgd fram. Og so fingu bygdarfólkini eisini høvi til at seta spurningar.

Sosialurin fréttir frá Landsverkfrøðinginum, at nógv varð spurt og fólki lat væl at ætlanini.

Tíðarætlanin vísir, at forkanningarnar til ferjuleguna byrjaðu í desembur 2000 og vóru lidnar í apríl í ár. Modellroyndirnar byrjaðu í novembur 2001 og vóru lidnar í juni í ár. Skipssimuleringarnar vóru eisini í apríl, og projekteringin fer fram í oktobur í ár. Og so er ætlanin at bjóða arbeiðið út tann 10. oktobur í ár.

Bjørn Kalsø, bygdarráðsformaður á Syðradali og Húsum, heldur, at tað var eitt gott hugskot at hava eina tílíka framløgu, har fólkið í oynni fekk høvi at seta spurningar, tí so eru tey greið yvir gongdina í arbeiðinum og vita eisini, hvat fer at henda nær.

Hann heldur eisini, at ein tílík ferjulega fer at hava stóran týdning fyri oynna.

- Tað er sjálvandi torført at siga akkurát, hvat hon kemur at týða fyri oynna og fólkið, men tað fer so avgjørt at lætta munandi um arbeiðsumstøðurnar bæði hjá bøndunum og smoltstøðini, sum er her. Umframt, at tað eisini fer at verða léttari hjá fólki, sum ferðast dagliga at koma aftur og fram, greiðir Bjørn frá.

Tá hann tosar um bøndurnir og smoltstøðina, hugsar hann serliga um tað at fáa fóður og annað tílíkt til og frá oynni. Og eisini olju.

- Eitt nú nýtir smoltstøðin nógva olju og fóður. Tað kann vera torført at fáa til oynna, og tá noyðast tey so at finna aðrar loysnir – eitt nú at leiga annan bát. Tað er ein sera kostnaðamikil loysn, so eg dugi ikki at síggja annað enn, at tað fer at lætta munandi um hjá teimum, tá ferjulegan er komin, heldur Bjørn Kalsø.

Tað eru umleið 20 bilar í oynni í dag, men Bjørn væntar, at talið fer at økjast, tá ferjulegan er liðug.

Arbeiðið at gera ferjuleguna á Syðradali kemur at kosta umleið 20 milliónir krónur. Tað eru játtaðar 16 milliónir krónur á fíggjarætlanini.

Arbeiðið verður, sum sagt, boðið út í oktobur og ætlanin er, at byrja arbeiðið seinast í oktobur ella fyrst í novembur. Tað fer helst at verða arbeitt fyri tað mesta uppi á landi í vetur, tí tað er ikki vist, at umstøður verða til at arbeiða á sjógvninum.

Nær arbeiðið verður liðugt, kemur sjálvandi ann upp á hvussu alt fer at ganga, og hvussu tann, ið fær arbeiðið, kemur at arbeiða. Men væntast kann, at ferjulegan á Syðradali í øllum førum verður liðug á sumri í 2004.

So verður spennandi at vita, hvat fyri skip kemur at røkja siglingina um Kalsoyarfjørð til ta tíð. Tá verður so undirsjóvartunnilin um Vestmannasund liðugur, so tá skuldi onkur ferja verið til yvirs. Bjørn Kalsø metir, at ein ferja á stødd við Sam verður hóskandi til Kalsoyarfjørð.



*Modellmynd av ferjuleguni á Syðradali á Kalsoynni. Arbeiðið verður bjóðað út í oktobur í ár*



*Hetta er tekningin av ferjuleguni á Syðradali á Kalsoynni*

# Mangla eisini pedagogar í Tórshavn

**Katrin Petersen, samskipari av barnaansingini í Tórhavnar Kommunu sigur, at tørvurin á pedagogum í høvuðsstaðnum eisini er stórur. Barnaansingarøkið í kommununi veksur alsamt og tørvurin á pedagogum harvið**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

Katrin Petersen sigur, at ein kanning er gjørd á stovnunum í Havn um, hvussu nógvir pedagogar eru í starvi. Og kanningin vísir, at eini tríati ársverk eru, sum ikki eru sett av pedagogum. Her skal tó leggjast aftur at, at verri enn so allir stovnarnir hava svarað kanningarspurningunum enn, tí nú er summarfrítíð, men sum sagt, so mangla pedagogar í tríati ársverkum út frá teimum, ið hava svarað.

Í blaðnum í gjár, segði Jancy B. Klein, leiðari á sosialu deild í Klaksvíkar Kommunu, at tað hevði onki gjørt, um tveir flokkar av pedagogum vórðu tiknir inn um árið á námsfrøðiligu útbúgvingina á Føroya Læraraskúla. Jancy helt, at tað fór at bøta munandi um tørvin á pedagogum, um so hevði verið.

Katrin tekur undir við henni í hesum. Barnaansingarøkið í Tórshavnar Kommunu er sera stórt. Fólkatalið í Havnini veksur alsamt og harvið talið á børnum, ið hava tørv fyri ansingarplássi eisini.

Men Katrin vísir á, at hendan býráðssamgongan setti sær sum mál at útvega fleiri ansingarpláss. Og tað hevur eisini eydnast teimum í ein mun. Seinasti nýggi stovnurin, sum komin er, er dagstovnurin í Øknagerði, har pláss eru fyri 60 børnum, umframt, at eisini er pláss fyri 10 til 12 børnum við serligum tørvi.

Um pedagogar í dag søkja meiri inn á serøkið enn barnaansingina, veit Katrin ikki at siga fyri vissu, tí barnaansingarøkið er so nógv størri enn serøkið.

Hon sigur, at fyrst í komandi ári fara tveir stovnar at lata upp í Tórshavnar Kommunu. Annar verður í Homrunum úti á Argjum, meðan hin verður uppi á Løgmannabreyt í Hoyvík, har øll tey nýggju húsini skulu byggjast. Hesir stovnar fara báðir at kunna taka ímóti 60 børnum hvør, so talið á stovnsplássum í Tórshavnar Kommunu økist við 120 fyrst í komandi ári.

Tann 1. januar í ár stóðu 225 børn á bíðilista í Tórshavnar Kommunu. Hetta eru øll børn, sum onki ansingarpláss hava. Harumframt er ein annar bíðilisti, har børn sum eru í dagrøkt standa og bíða eftir einum stovnsplássi. Tí eins og í Klaksvíkar Kommunu arbeiða tey eisini í Havn fram í móti, at dagrøktararnir skulu hava børn í aldrinum 0 til 3 ár, og so skulu tey sleppa á stovn.

Orsøkin til, at talið á bíðilistanum, sum nýtt er omanfyri, er frá 1. januar og ikki í dag, er, at tey júst hava tikið nýggj børn inn í skipanina, og tí er listin ikki dagførdur enn. Men tað verður hann, so skjótt sum øll tey børnini, sum hava fingið pláss í august eru byrjað. Tá verður talið á børnum á listanum so minni aftur, men hann veksur skjótt aftur eftir tað, tí tað verða jú allatíðina børn fødd og børn, sum flyta til kommununa.

Tað verður gingið eftir bíðilistanum, tá nýggj børn verða tikin inn í barnaansingarskipanina í Tórshavnar Kommunu. Tað vil siga, at børnini verða tikin inn eftir uppskrivingardegnum, og ikki eftir tørvi hjá dagrøktara ella stovni, sum tað verður gjørt eitt nú í Klaksvíkar Kommunu.

Roynt varð at fáa eina viðmerking til støðuna frá landsstýriskvinnuni í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, men hon var ikki at hitta, áðrenn blaðið fór til prentingar.

